

# EINGIN FRANSK Á SKARVANESI

**GERANDISDAGUR** Fyri tann ókunnuga og tann skundmikla er ikki nógv sum bendir á lív í lítlu og fjarskotnu bygdini á vestursíðuni á Sandoynni. Nógv venda bara niðri í bygdini, og hava als ikki sæð tað lív sum hóast alt er her.

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Skarvanes: Í einum lágum og sterktlitaðum húsum á Skarvanesvegi 6 hevur Anna skipað sín gerandisdag. Ein gerandisdagur sum varð kollveltur tann 6. desember, tá Arnbjørn varð borin í heim, nakað væl fyrri enn ætlað.

Tað einasta regluliga í gerandisdegnum er at Hans Kristjan hvønn dag skal koyrast í Meginskúlan og verður heintaður seinni um dagin, og leggur tá leiðina saman við vinmonnunum til Skopunar.

Hann hevur eisini onkutíð vinmenn við sær til Skarvanesar. Og tá mugu teir bara finna útav at spæla saman allan dagin, tí tað er ikki bara so sum at siga tað, um ein brádliga ætlar sær til hús aftur.

– Ja, her er ikki annað at gera hjá mær enn at koyra hann í skúlan inni í Dal, tí higar koyrir eingin skúlabussur, staðfestir Anna, sum í løtuni hevur farloyvi frá starvi sínum sum lærari við sama skúla.

– So eg má bara avstað við honum, óansæð hvussu veðrið skikkar sær. Hetta ger sjálvandi sítt til, at eg hóast alt havi ein vanligan gerandisdag.

– Tað verður sjálvandi ikki altíð grivið higar um morgunin, og tá so er, sleppa vit ikki av bygdini. Men tað eru júst slíkir morgnar, sum honum dámar best, tí tá er eingin skúlagongd.

Aftaná skúlatíð fer Hans Kristjan sum oftast til ommuna í Skopun, og har plagar eisini sum oftast at vera ein døgurðabiti at fáa.

– Jú, hetta er í fínasta slag, serliga hjá mær, sum tími so illa at gera mat.

## Um fjørðin

Anna er bachelorur bæði í søgu og stjórnmálafrøði, og kundi tí saktans havt funnið sær starv í høvuðsstaðnum, soleiðis at hon kundi brúka sína útbúgving.

– Onkur vildi sagt, at um ein skal arbeiða í Havn, so er eisini neyðugt at búgva har. Men tað haldi eg ikki, tí tað ber jú saktans til at ferðast ímillum við Teistanum. Eg vil tó siga, at nógvir metrar um sekundið av landsynningi ikki akkurát eru so tiltrekkjandi í Skopunarfirði.

– Hinvegin trúgvi eg neyvan, at nakar arbeiðsgevari hevði gjørt seg so tvørligan, at hann ikki gav loyvi til nakrar arbeiðsdagar heima við hús, orsakað av veðri.

Ferðasambandið til meginøkið er eitt. Annað er kostnaðarstøðið í Havn, har ein, sambært húsmóðurini á Skarvanesi, ikki fær so nógv fyri pengarnar, og haraftrat má læna seg til milliónir um ein ætlar at keypa sær hús har.

– Úrslitið er bara, at ein verður trælbundin restina av lívinum. Spurningurin er allatíðina, hvat ein vil hava fyri pengarnar. Er tað alt stríðið vert, bara fyri at búgva 10 minuttir frá arbeiðsplássinum?

– Nei, so taki eg heldur Skopunarfjørð. Eg meini, hann er ikki sooo drúgvur, og báturin siglir fleiri ferðir um dagin. Tað er einki problem fyri meg, slær Anna fast.

## Franskur visittur

Av Sandi og vestur til Skarvanesar eru bert átta kilometrar. Men hetta er ikki longur burtur enn so, enn at fólk javnan koma á gátt hjá Annu.

Gerandisdagurin í bygdini er heldur ikki so nógv øðrvísi enn aðrastaðni kring oyggjarnar. Spurningur er heldur, hvussu ein hevur tað saman sosialt.

Í bygdini hevur Heilbrigdi skipað fyri ávísum skeiðum, eins og ráðgevin Poul Jákup Thomsen og konan, Claire hava síni hús her.

Tað serstaka er, at tá fólk kom á gátt á Skarvanesvegi 6, er talan ikki um ein franskan visitt, har tey bert fara úr øðrum skónum, meðan tey fáa sær ein drekkamunn og síðani sleppa sær aftur á dyr sum skjótast.

– Nei, tey plaga at ringja áðrenn – júst sum í Danmark – fyri at vita um eg eri í bygdini. Eingin tímir at koyra higar, uttan at fyrst at vita, um eg eri inni.

– Og tá tey so koma, er tað bæði við pakka og sekki, tí tey steðga allan dagin, greiðir Anna frá.

snorri@sosialurin.fo

## Fakta

Skarvanes er ein bygd í Húsavíkar kommuna á Sandoy, vestan fyri Dalur.
Hon er gomul bygd, og fólk hevur búð har, í hvussu so er, frá um ár 1500. Bygdin var millum bestu kornpláss í landinum, við sera góðum sólargangi, har hagin er rættiliga góður, so livilíkindini vóru hampilig, hóast møguleikar fyri útróðri vóru smáir, tí brimpláss er.
Fráflyting hevur verið, og ár 2000 doyði seinasta fólkið á Skarvanesi. Frá 2005 eru tey 5 fastbúgvandi, og í Djúpadali, tveir kilometrar norðanfyri býr eitt húski.
Húsini í bygdini, verða mest nýtt sum summarhús, men sum víst er á í greinini er lív - og enntá nýtt lív - aftur komið í Skarvanes.

## 400 ÁR

*– Tá maðurin, Sjúrður, fór niður at lesa høvdu vit bert eina inntøku, mína. Ístaðin fyri at leiga dýrt í Havn, avgjørdu vit at flyta suður higar í 2007. Og skuldi tað komið til tað, so kann ein saktans arbeiða í Havn ella aðrastaðni, og búgva her á Skarvanesi, sigur Anna Olsen*